# Nýggi Beinir avstað um ein mánað

**Sunnudagin var ein hugalig sjón at síggja, tá trolarin Beinir kom á Havnina. Tað er reiðaríið Kimbil sum hevur keypt hann úr Danmark.**

FISKISKAPUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** – Tað fer helst at ganga meginparturin av hesum mánaðinum, áðrenn Beinir fer til fiskiskap, sigur reiðarin, Aksel Hansen við Sosialin.

Hóast komin væl til aldurs bilar framburðshuginum einki, nú hann kundi taka ímóti hesum nýggja trolara sínum.

Beinir er góðar 42 metrar langur og góðar 10 metrar breiður og hevur 1800 HK maskinu.

– Hann hevur rættiliga stóra last. Og hann kann tí lasta nokk, sum Aksel Hansen tekur til. Ætlanin er at royna undir Føroyum.

Reiðaríið hevur keypt trolaran klassaðan fyri 14,8 mió. kr.

### 11 mans

Nýggjasti trolarin í føroyska fiskiflotanum er ein fyrrverandi rækjutrolari.

Ætlanin er nú at seta eina fiskaverksmiðju í hann, ístaðin fyri rækjuverksmiðjuna, sum stóð har frammanundan.

Meginparturin av hesari verksmiðjuni var tikin úr áðrenn fráferðina til Føroyar, men okkurt er tó eftir at taka úr og gera av nýggjum.

Tá hesin mánaðurin er av væntar reiðarin at skipið kann leggja til brots á sín fyrsta túr við Christiani Müller úr Hvalba sum skipara.

Við Beinir verða 11 mans.




*Aksel Hansen fegnast um nýggja trolara sín, Beinir. Navn og nummar vóru málað á trolaran í Danmark, men annars skal restin av umvælingini gerast í Føroyum*



*Beinir fer væntandi til fiskiskap um ein mánað*

# Nýgg vinnulóggáva send til hoyringar

Arbeiðið við at dagføra føroysku vinnulóggávuna hevur verið ávegis í eina tíð. Endamálið við hesum arbeiði er at tryggja, at føroysk vinnulóggáva fylgir teimum standardum, sum eru galdandi í londunum kring okkum.

Saman við einum arbeiðsbólki undir Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, hevur Vinnumálaráðið staðið fyri hesum arbeiði, og nú er hetta komið somikið væl ávegis, at uppskot um dagføringar nú er sent vinnuni til hoyringar.

Tað, sum er er sent til horyingar, fevnir um ársroknskaparlógina, parta- og smápartafelagslógina, lógina um vinnurekandi grunnar og lógina um vinnurekandi virksemi. Allar vórðu hesar lógirnar settar í gildi eftir danskari fyrimynd í 1993. Síðani eru tó fleiri dagføringar gjørdar í Danmark, uttan at hetta tó er gjørt í Føroyum.

**-mørk**

# Íslendsk málningalist í Listaskálanum

Leygardagin 5. august kl. 16 letur ein listaframsýning upp í Listaskálanum við heitinum "Endurnýggjað íslendsk málningalist."

Fimm listafólk fara at sýna fram, tey eru Odd Nerdrum, Georg Guðni Hauksson, Stefán Boulter, Karólína Lárusdóttir, Kristin Gunnlaugsdóttir.

Heðin Mortensen letur framsýningina upp og hon verður opin til 24. september.

**el**

*Odd Nerdrum er ein av teimum fimm listafólkunum ið sýna fram á framsýningini "Endurnýggjað íslendsk málningalist."*



## STUTT SAGT

### Nú ræður um at skunda sær

Enn er ikki útselt til Summarfestivalin, men á einstøkum sølustøðum hava tey onkrar av seinastu døgunum verið í uppisetri fyri atgongumerkjum.

– Tað er jú so, at vit royna at samskipa søluna á ymsu sølustøðunum. Vit hava so eisini roynt at býtt atgongumerkini til ymsu støðini eftir, hvussu sølan áður hevur verið her, men sjálvandi eru frávik. Og hesi kunnu sjálvandi arga nakað, sigur Steintór Rasmussen.

Steintór leggur tó afturat, at tey nú støðugt ansa eftir, at atgongumerki eru tøk á ymsu støðunum. So er spurningurin bara, hvussu leingi tann støðan stendur við, ella um festivalurin longu undan fríggjadegnum kann melda fult hús.

**-mørk**

### Rúni Brattaberg í Elduvík

Talan verður um forkunnuga og ivaleyst eisini stórsligna tónleikauppliving, sum kann upplivast í Elduvík í annaðkvøld.

Saman við konu síni, Susanne, er Rúni Brattaberg í løtuni heima í summarfrí, og tey bæði hava játtað at geva føroyingum eina uppliving við stórslignu framførslum sínum. Bæði liva tey sum yrkissangarar, og seinastu tíðina hava framførslurnar kring Europa verið heilt nógvar í tali.

Saman við klaverspælaranum, Christopher Arpen, fara tey í morgin klokkan 19 at hava framførslu við gjónna í Elduvík, og har kunnu áhoyrar væntandi uppliva nakrar av mongu tónlistarligu góðbitunum, sum tey bæði kunnu borðreiða við.

Og er veðrið ikki vildar, eru eisini ráð fyri hesum. Sagt verður nevnliga, at gerst tað neyðugt, so verður konsertin flutt inn í krikjuna í Elduvík.

**-mørk**